# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Skamskotin skuri





*Myndir: Kári Mikkelsen*

Heystið er komið, og nú er aftur loyvt at skjóta fugl. Ikki øll veiðifólk koma líka væl frá at taka byrsuna við sær á flot. Tak til dømis hendan stakkals skuran, sum varð skamskotin í Nólsoyarfirði leygardagin, uttan at skjúttin ómakaði sær at fáa lívið av honum við at geva honum eitt skot afturat ella taka fuglin upp og kippa hann. Mennirnir á einum øðrum báti tóku skuran upp, og tá teir sóu, at bæði beinini vóru knúst av høglum, umframt at skurin eisini hevði høgl í kroppinum, gjørdu teir av at kippa fuglin. Hesar báðar myndirnar eru tiknar áðrenn og eftir, at skurin varð avlívaður og harvið slapp undan størri pínslu.

w w w . b k v . f o



## Awi 27 til sølu

Um hóskandi boð fæst selja vit ein AWI 27 bát. Báturin er bygdur 1983 og hevur eina 68 HK SAAB maskinu. Hann hevur alla vanliga nautiska útgerð. 3 DNG snellur og eina til eykadeilir. Báturin hevur fiskiloyvið

Sí annars okkara Sølutorg, www.bkv.fo har vit hava sethús, bátar og leysafæ til sølu.

Sp/f Roknskaparstovan BKV

**BKV**
Jákup Dahlsgøta 2
Telefon 310090
Telefax 312091
bkv@bkv.fo
FO-100 Tórshavn

**BKV**
í Nesi 4
Telefon 361376
Telefax 361309
bkv@bkv.fo
210 Sandur

QUALITY INNOVATION RELIABILITY





Bakkafrost samtakið framleiðir laks og liðugvørur úr laksi. Framleiðslueindirnar eru í Norðoyggjum og suður Eysturoy, skipaðar í 3 smoltstøðum, 7 alistøðum umframt kryvjivirki í Klaksvík, portiónsvirki og kassavirki á Glyvrum. Vøruúrvalið er breitt innan laksavørur. Høvuðsvøran er laksaportiónir til retail marknaðin í ES. Tað starvast umleið 200 fólk í samtakinum.

## Maskinmeistari

Søkt verður eftir maskinmeistara/maskinmanni til Bakkafrost.

Viðkomandi, ið settur verður, skal hava viðkomandi royndir og útbúgving, arbeitt verður saman við einum maskinmeistara á einari av tveimum skiftivaktum. Tann í settur verður, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Áhugaði biðjast ringja til Kára Jacobsen, virkisleiðara tel 235011. kari@bakkafrost.com

Starvsstaður: á Glyvrum.

Umsóknarfreist: 10/10

Um fyrispurningar eru viðvíkjandi starvinum, so kunnu tygum tosa við Kára Jacobsen, virkisleiðara. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Bakkavegur 8
FO-625 Glyvrar
Telefon: 40 50 00
bakkafrost@bakkafrost.com
www.bakkafrost.com

BAKKA FROST

P/F TANGAVIRKIÐ

**Starvsfólk til okkara umsiting.**

Søkt verður eftir starvsfólki (m/k) til umsiting okkara (skrivstova og handil) at byrja skjótast gjørligt.

**Starvslýsing:**
Starvið umfatar fakturering, innkeyp til - og søla úr handlinum og arbeiði í tí sambandið.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta av tær, at tú er jaligur, fyrikomandi og dugur at arbeiða sjálvstøðugt. Eisini rokna vit við, at tú hevur í minsta lagi grundleggjandi teldukunnleika.

**Setanartreytir:**
Starvið er heiltíðarstarv. Løn og setanarviðurskifti eftir avtalu. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mortan Mortensen, tlf. 573065.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum v.m. verður at senda innan 18. oktobur 2008 til:

**P/F Tangavirkið**
**900 Vágur**

*P/F Tangavirkið hevur í dag uml. 15 fólk í arbeiði, ið starvast í einari vælútgjørdari nýmótans smiðju.*

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!